Álit

í

løgtingsmáli nr. 21/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av almannaveitingum (Hækking av frádráttarfríari inntøkuupphædd fyri fólkapensjónistar)

Landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg, hevur lagt málið fram 29. september 2023, og eftir 1. viðgerð tann 6. oktober 2023 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 19. og 26. oktober og 9. og 16. november 2023.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Landsfelag Pensjónista, áhugabólk fyri pensjónistar, Búskaparráðið og landsstýriskvinnuna í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin býtt seg í tríggjar minnilutar.

Ein minniluti (Jørgen Niclasen og Árni Skaale) hevur hesar viðmerkingar:

Hesin minnilutin er sannførdur um, at tað altíð skal loysa seg at arbeiða, eisini tá ein gerst eldri. Undanfarna samgonga lækkaði mótrokningina í fólkapensjón frá 60% niður í 20%. Tað merkir, at einans 20 kr. verða mótroknaðir fyri hvørjar 100 kr. í inntøku. Men inntøkumarkið varð samstundis lækkað frá 61.900 kr. niður í 45.000 kr. Júst hetta síðsta hevur fingið mest uppmerksemi.

Hetta markið er alt ov lágt, tí talan er ikki bara um arbeiðsinntøku, men eisini útgjald frá egnari eftirlønaruppsparing. Tað merkir fyri rættuliga nógv, at mótrokningin byrjar frá fyrstu lønarkrónu. Hækkingin hjá landsstýrinum upp á 61.900 kr. er alt ov lítil og vil ikki náa endamálinum um at eggja fólki til arbeiðið.

Fyritíðarpensjónistar kunnu forvinna 90.000 kr, áðrenn mótrokning byrjar. Minnilutin heldur, at rættast er at líkastilla fyritíðarpensjónistar við pensjónistar, tá talan er um mótroking.

Tá ein fer um pensjónsaldur, sleppur ein undan at rinda sosial gjøld, sum t.d. til Samhaldsfasta, barsilsgjald og ALS. Hinvegin fær ein útgjald úr Samhaldsfasta. Sáttmálarætturin til eftirlønaruppsparing verður útgoldin sum eyka løn, tá ein er komin til pensjónsaldur.

Ein kann eisini útseta fólkapensjónina og so fáa eitt hægri útgjald seinni. Rættuliga nógv hava valt henda møguleikan. Um eingin mótrokning verður, so er lítið sannlíkt, at fólk útseta sína pensjón.

Men fyriliggjandi uppskot um at hækka mótrokningina til 61.900 kr. er ov lítið til at røkka endamálinum við lógini.

Hesin minnilutin setir tískil fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1 verður “61.900,00” broytt til: “90.000,00”

Viðmerkingar
Við hesi broyting verður mótrokningarmarkið hjá fólkapensjónistum tað sama sum hjá fyritíðarpensjónistum.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur hesin minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Ein annar minniluti (Johan Dahl og Kaj Leo Holm Johannesen) hevur hesar viðmerkingar:

Hesin minnilutin metir ikki, at fyriliggjandi uppskot, har inntøkumarkið áðrenn mótroknað verður, verður økt við 16.900 kr., frá 45.000 kr. til 61.900 kr., vil hava við sær, at fleiri pensjónistar koma á arbeiðsmarknaðin eftir, at tey eru farin um 67 ára aldur.

Við hesum viðmerkingum tekur hesin minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Ein triði minniluti (Hans Jacob Thomsen, Súsanna Bertholdsen og Liljan Weihe) hevur hesar viðmerkingar:

Í samgonguskjalinum stendur, at mótrokningin í arbeiðsinntøku av fólkapensióni verður endurskoðað. Tað hava vit gjørt við hesum uppskotinum, umframt at vit hækka markið frá 45.000 kr. til 61.900 kr. galdandi fyri útgjalding av veitingum frá og við januar 2024.

Orsøkin til uppskotið er politiska ynskið um, at fólkapensjónistar, sum hava inntøkur aftrat fólkapensjón og útgjald frá Samhaldsfasta, skulu hava betri fíggjarligur umstøður. Við at hækka frádráttarfríu inntøkuupphæddina fer meginparturin av fólkapensjónistum, sum hava inntøkur aftrat fólkapensjón og útgjald frá Samhaldsfasta, ið er hægri enn 45.000kr. um árið, at fáa meira útgoldið í pensjón.

Vit hava metlágt arbeiðsloysi í Føroyum og tað er stórur eftirspurningur eftir arbeiðsmegi. Tað eru fleiri ymisk størv, sum ikki eru fulltíðarstørv, ið pensjónistar kunnu røkja; tá er umráðandi, at inntøkumarkið ikki forðar hesum, men heldur eggjar teimum at taka eyka tøk. Við hesum uppskotinum fer arbeiðsútboðið møguliga at hækka og fer tað at bera betur til hjá pensjónistum at taka fleiri eyka tøk, so samfelagshjólini kunnu mala, uttan at tað fær fíggjarligar avleiðingar fyri arbeiðstakaran.

Um mótrokningin verður avtikin heilt, sum Landsfelag Pensjónista mælir til, so fer tað at kosta uml. 100 mill. krónur. Tað er í andsøgn við samgonguskjalið, har tað stendur, at vit vilja tryggja ein haldføran og sjálvberandi búskap fyri okkum og komandi ættarlið. Vit hava stórar avbjóðingar fyri framman við fíggjarliga haldførinum, og við hesi broyting hækka vit um munin á einum pensjónisti og einum miðalløntum lønmóttakara. Sambært Búskaparráðnum hevur ein pensjónistur meira at liva fyri enn ein miðalløntur lønmóttakari.

Hetta uppskotið hevur við sær, at útreiðslur landskassans til fólkapensión fara at hækka við leysliga mett 6,5 mill. kr. á komandi fíggjarlóg. Fyrivarni skal takast fyri, at metingin byggir á inntøkur hjá fólkapensjónistum í 2022.

Við hesum viðmerkingum tekur hesin minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 6. desember 2023

Jørgen Niclasen formaður	Liljan Weihe næstformaður	Kaj Leo Holm Johannesen
Johan Dahl	Árni Skaale	Hans Jacob Thomsen
	Súsanna Bertholdsen	